

*Umborð á Seagul inni í Grátufjørðinum. Aftast ein maður á Seagul, standandi uppi eg sjálvur, í miðuni Jens Kristian, frammi við vantið ein maður á Seagul. Í bátinum: Elias heldur í við einum haka og fremst Símun*



*Í sunnaru havn í Grátufjørðinum. Fyrstur frá vinstru Heini D úr Haldórsvík. Nr 3 er Víkartindur. Tað var við teimum báðum bátunum, Diana Jacobsen var kokkur*



*Seagul liggur her í Grátufjørðinum. Hon liggur úti á sjálvari víkini. Tað var ikki pláss til at koma inn har, sum bátarnir hildu til. Næstan út har, sum skipið liggur, var ískanturin, sum Líðarenni lá við, tá ið vit lossaðu útgerðina til skúrin. Víkin er aftan fyri skipið*



*Hetta er á tí gamla búplássinum í Grátufjørðinum. Hetta er grundin á húsinum hjá lærarunum í Grátufjørðinum. Á grundini sita: Mathea, Jens Kristian, Edvard, ein grønlendingur sum fiskaði við okkum og Elias*

byrjaði at bjarga fiskinum úr skipinum, men teir hildu uppat. Eg hoyrdi, at tað komst av tí, at skipið stóð so illa. Tað er dýpi beint norðan fyri boðan, og skipið stóð og rillaði. Tað kundi hvørja løtu glíða norður av boðanum, og so kundu fólkaskaði staðist burturúr, um nakar var umborð.

Hesin boðin var ógvuliga meinur. Hann lá beint suður úr Svartaskeri, og ímillum boðan og Svartasker var siglingin inn til Føroyingahavnina. Varð siglt ov sunnaliga á kundi blíva galið.

Sunnan fyri Føroyingahavnina, nakað sunnan fyri Tre Brødre, var eitt sker, sum var næstan meinlíkt Svartaskeri. Landslagið rundan um minti eisini fyri tí ókunnuga um landslagið við tað norðara skerið.

Ein føroyskur trolari fór á hetta skerið og bleiv vrak. Tað hevur helst verið tíðliga á vári í 1955. Eg minnist, at tá ið vit vóru á útróðri og sigldu fram við, sást forendin á skipinum standa á skerinum.

Hesin trolarin æt Kópanes og var úr Vestmanna. Hann skuldi fiska til Nordafar.

Rituvíkingar høvdu átt hann áðrenn, tá æt hann Skoraklettur. Hetta hendi fyrsta túrin, sum hann kom inn at landa.

Vit byrjaðu við fýra monnum hetta summarið, men skjótt fór Manasse av. Hann var ein ungur grønlendingur, sum hevði verið við okkum árini frammanundan.

Hann fór við Hans Oliver Højgaard og bleiv verðandi við har eini tvey ella trý ár.

Hetta var í teirri tíðini, tá ið teimum mongu línubátunum manglaðu fólk, og teir tóku grønlendskar fiskimenn við. Nógvir av teimum endaðu eisini í Føroyum og blivu verandi. Mong minnast enn Emanuel Petersen. Hann var fleiri ferðir á veg til Grønlands, men kom aftur hvørja ferð, tí "jeg kan ikke undvære Færøerne!"

Vit vóru so verandi tríggir menn við bátinum. Umfram meg sjálvan vóru vit svágur mín Hjalgrím Petersen av Argjum og Símun Joensen av Tvøroyri. Rebekka Lund av Fiskanesi var kokkur.

## Nú kemur konan eisini við!

Í 1965 eri eg eisini í Føroyingahavnini, men hetta summarið er Mathea, kona mín, við sum kokkur. Tað var blivið so vanligt at hava konufólk til kokkar, at vit blivu samd um at royna tað. Vit høvdu eisini tann elsta sonin, Jens Kristian, við okkum. Hann var tá fimm ára gamal.

Eitt kvøldið vit ikki komu aftur fyri veður, gjørdi ein maður seg inn á skúrin, meðan vit vóru burtur.

Hurðin var stongd, men maðurin royndi at koma inn gjøgnum eitt vindeyga, sum ein rútur var brotin í. Mathea hevði úr at gera við at verja seg innan fyri við einum kusti.

Eisini hevði hesin sami maður verið yviri við skúrin hjá Jeffri Durhuus og roynt at seta eld á. Men har var manningin komin upp til at fara til útróðrar, so teir fingu forða fyri tí.

Tílíkar hendingar gjørdu, at man føldi seg ótryggan. Hetta var galdandu bæði fyri tey, sum vóru á landi og hjá okkum, sum vóru frá húsum um dagarnar.

Seinni vísti tað seg, at hesin maður var stýrimaðurin á einum týskum trolara, sum lá inni á Nordafar.

Tað er langt at ganga og ikki so lætt at finna hjá ókunnugum, so tað var væl tillagt. Eisini hevði maðurin karvað telefonkaðalin, sum lá millum Nordafar og Gomlu Føringahavnina. Vit hoyrdu so seinni, at hesin góði maður var heimsendur.

## Aftur í Grátifjørðin

Hetta summarið var vánaligur fiskiskapur á leiðunum við Føroyingahavnina, í hvussu so er hjá okkum. Men tað frættist frá góðum fiskiskapi í Grátufjørðinum. Vit fóru so suður hagar. Tað var 8. august, at vit komu í Grátufjørðin.

Tað stóðu tveir tómir skúrar í norðaru havn, sum tað bleiv kallað. Hesar áttu sumbingar. Hetta var ein íbúðarskúrur og ein saltingarskúrur. Men teir vóru ikki har yviri hetta summarið, Tað var liðið so nógv út, at vit vistu, at teir komu so ikki yvir aftur. Vit fluttu so inn í íbúðarskúrin.

Saltingarskúrin keypti eg um veturin at innrætta sum íbúðarskúr várið eftir. Fyrsta dagin vit vóru úti, fingu vit 7-8000 pund, hetta var góður fiskiskapur. Hetta var nær landi við eina oyggj, sum kallaðist Hestoyggin. Hon liggur við sunnara arm á Grátufjørðinum. Fiskiskapurin har suðuri vignaðist hampuliga væl í mun til tað, sum hevði verið har norðuri. Tilsamans fingu vit 91.236 kg, sum gav kr. 60.135.48 í avreiðingarvirði, og ein manspart uppá kr. 10.724,57. Ikki kann tað sigast at vera stór inntøka fyri sløk hundrað tons hjá fýra monnum.

Vit komu yvir við Skanderborg, sum var eitt stórt og skjóttgangandi skip. Vit høvdu ikki meira enn fimm samdøgur yvir til Grønlands, men tað var eisini fínasta veður allan vegin.

Heim aftur komu vit eisini við Skanderborg, tíðin heim var nakað tann sama. Har í víkini sum vit vóru, Norðaru havn, vóru bara tríggir bátar hetta summarið. Teir vóru Ravnur av Eiði, Grani úr Vík og Bogi, báturin hjá mær.

Við hettar summari vóru umframt meg og Matheu, Mortan Jacobsen úr Víkarbygri, Símun Joensen av Tvøroyri og ein úr Godthåb, sum kallaðist Edvard.

## Sprongdu ís við dynamitti

Í 1966 komu vit eisini yvir til Grønland við Skanderborg. Sum nevnt keypti eg saltingarskúrin frá einum sumbingi, Jørmund Stenberg, um veturin 1965.

Við okkum høvdu vit tilfar til at innrætta saltingaskúrin við.

Líðarenni, sum pápi mín átti, førdi tilfarið suður í Grátufjørðin. Hetta var ein bátur um 25 tons. Hann hevði siglt fyri Nordafar við fiski og við útgerð millum Føroyingahavnina og Grátufjørðin í 1964 og 1965. Men nú var hann blivin ov lítil, tí útróðrarbátarnir vóru blivnir fleiri. Sluppin Seagul hevði yvirtikið siglingina.

Vit komu so suður í Grátufjørðin við Líðarenni. Tað hevur verið um hálvan mai. Tá lá víkin full av føstum vetrarísi. Hetta var vanligt við trongum víkum, tá ið komið var tíðliga yvir. Hetta við ísinum var helst har. sum nógv feskt vatn var. Tá frysti jú skjótari.

Hjá okkum hevði tað týdning, at tað rann ein stór laksaá út í hesa trongu víkina.

Tað bleiv so lagt at ískantinum. So var farið at fáa tilfarið fyrst niður á ísin, og síðan var farið at draga tað inn til skúrin. Til hetta brúktu vit eina lítla jollu hjá Líðarenni. Tilfarið bleiv lagt í hana. So drógu vit hana sum sleðu, men hetta var ikki so lætt sum at siga tað.

Tað mundi vera einar 2-300 metrar frá ískantinum inn til skúrin, men hetta gekk kortini bara væl.

Men enn var ikki liðugt. Nú var eftir at innrætta skúrin. Vit innrættaðu umleið helvtina av honum. Skúrinum var jú rættuliga stórur, so vit høvdu ikki brúk fyri øllum til at búleikast í. Vit innrættaðu hann í trý rúm, ein køk, eitt manningarrúm og eitt kamar til mín og Matheu.

Til hetta arbeiðið høvdu vit eina góða viku.

Meðan hetta gekk fyri seg, vóru vit einsamallir í víkini. Hini bátaløgini komu ikki fyrr enn ein túr seinni. Eg haldi heldur ikki, at nakar var komin í sunnaru víkina.

Tá ið so hinir menninir komu, var farið at rudda víkina fyri ís. Til tað bleiv nakað av